# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Røðan hjá Obama

Røða Obamas við innsetanina í gjár var framúr og heilt í flokki við røðurnar hjá Roosevelt og Kennedy. Røðan, sum varð hildin í einum eitt sindur lágmæltum tónalagi var marksetandi. Obama avmyndaði eitt nýtt USA, har dentur verður lagdur á samhaldsfesti og medmenniskjansleika. USA skal verða eitt samfelag, har fólk vara av hvørjum øðrum og taka ábyrgd av hvørjum øðrum – eitt samfelag, har ein "ansar eftir bróður sínum".

Víðari legði Obama stóran dent á stríðið móti arbeiðsloysi og fátækdømi og mælti til størri samfelagsábyrgd. Hann gjørdi vart við stóru trupulleikarnar á heimavølli so væl sum á altjóða vølli. Men hann undirstrikaði, at tað ber til at vinna á trupulleikunum, samstundis, sum hann ávaraði sínar landsmenn um, at setningurin fyri framman er tungur og avbjóðingarnar stórar. Obama tók framaftur nøkur av teimum stóru málunum frá valstríðnum og slóg fast, at hesum málum skal verða rokkið, samstundis sum hann ávaraði um, at hetta fór at taka tíð. Hann gjørdi ikki sørt burturúr búskaparkreppuni og teimum avmarkingum, sum komu av henni, og kann hetta vera orsøkin til, at røðan var meira lágmælt enn mong høvdu roknað við. Leggjast kann afturat, at Obama ikki var lágmæltur, tá hann umrøddi umhvørvið og veðurlagsbroytingarnar, har hann var bæði bersøgin og eggjandi.

Sum vera man vóru í røðuni tilsipingar til rættvísisstríðið hjá afroamerikansku borgarunum og hann gjørdi nakrar sera áhugaverdar og nemandi samanberingar við støðuna, tá alt byrjaði í sekstiárunum í suðurstatunum. Hann minti á Martin Luther King, sum í 1963 stóð á vøllinum frammanfyri Capitol og við síni gitnu I have av dream røðu kravdi javnrættindi fyri allar landsins borgarar. Vit eru komin langt, men enn er langt eftir á mál. Hugsjónarliga var røðan áhugaverd, tí hon legði seg so tætt upp at frælsishugsjónunum hjá teimum, sum á sinni stovnaðu USA. Tað, sum nú var hent, var eitt framhald av hesum frælsis- og javnrættarhugsjónum. Hetta staðfestu nógvir eygleiðarar, samstundis sum teir gjørdu vart við, at hetta var ikki vanlig vinstrahall tala, sum mong kundu ynskt og vóna. Men løtan var ikki til ideologiskar markeringar, men til orð, ið kundu savna og skapa eina kenslu av felagsskapi um almenn demokratisk virði. Eitt aðalendamálið var at geva fólkinum nýggja vón og trúgv á, at tað ber til at koma uppundanaftur og skapa eitt samhaldfast samfelag fyri øll.

Uttanríkispolitiski parturin hevur vakt miklan ans um allan heim. Obama boðaði frá, at USA aftur fór at átaka sær leiðandi altjóða leiklutin við ábyrgd fyri friði og framburði. Hann rætti hondina út til muslimska heimin samstundis, sum hann ávaraði víðgongd lond um ikki at fata hetta sum ein veikleika. Sum heild bar uttanríkispolitiski parturin boð um ein heilt nýggjan hugburð við denti á diplomati, virðing og samskifti. Samantikið var røðan háfloygd og jarðbundin um somu tíð. Hon var ætlað at geva fólki úti sum heima nýtt mót og trúgv á framtíðina. Røðan vísti okkum ein forseta, sum veit, hvat hann vil og sum skilur, hvat, ið skal til. Hon vísti umheiminum eitt USA, sum er við at koma fyri seg moralskt, demokratiskt, politiskt og sum ivaleyst eisini fer at koma fyri seg aftur búskaparliga so væl sum fíggjarliga. Ein megnarrøða hjá einum megnarforseta!

**Sosialurin**

## Nú tey hægru útbúnu ótálmað herja á landskassan

**JÓGVAN VIÐ KELDU**



**Onkur av okkara ráðandi – helst fleiri – mugu vakna og vekja okkara kravmiklu almennu stovnsleiðarar við starvsfólki**

Fyri stuttari tíð síðani fekk eg mær fatur á drúgvari bók á "antikvitets-netinum". Bókin hevur heitið "Esmann-Plumrose – Fra Dåse til drittel – Kapitler af 100 års Danmark erhvervshistorie 1864 – 1964."

So kann ein spyrja: "Hava vit nakað at læra 100 til 150 ár aftur í tíðina"?

Nú høvuðsstaðurin og allir almennu sentraliseraðu stovnarnir seinastu tíðina hava herja á landskassan, fyri at fáa størri bitar av køkuni, sum allar Føroyar gjalda til, havi eg hugsað um, hvussu hevði verið, um vit áttu fleiri, sum "kravdu meira av sær sjálvum". Tí fari eg at koma við eini endurgeving úr nevndu vælskrivaðu bók:

**Sunnur politikkur**

"I H. P. Hjerl Hansens posthumt udgivne bog: Danske Pionerer i Sibirien, har forfatteren Holger Rosenberg, som igennem et halvt hundrede år kendte Hjerl Hansen, skrevet en epilog. Han indleder den således:"

" Var det et skæbnespils uforklarelige luner, eller var det den naturlige kulmination af et for dansk foretagsomhed særlig frugtbart tidsafsnit, at Danmark i årene op imod århundredskiftet fostrede en række handels- og industrifolk, - H. N Andersen, Alexander Foss, Thomas B. Thrige m.fl. – der ikke alene tilførte landet store værdier, men også gjorde Danmarks navn kendt og æret rundt om jorden? Det sidste er vel det rimeligste.

Disse 90ernes forretningsmænd, der brød nye veje og grundlagde verdensomspænn-ende virksomheder, var mænd med store ideer, som de førte til sejr, fordi de ejede tro på deres sag og var i besiddelse af en sund realitetssans og en handlekraft, der ikke lod sig kue. Men de var også mænd med store idealer. Fædrelandskærlighed og kristentro var dybt forankret i deres sind, de ejede en indre moralsk styrke, og pligttroskab var et urokkeligt begreb i deres karakter.

De forlangte ikke mere af nogen anden, end de til enhver tid var villige til selv at yde – det var derfor de af og til blev kaldt hårde – og det er karakteristisk ikke mindst for dem, der fra små kår arbejdede sig op til de store stillinger, de kom til at beklæde, at penge for dem aldrig blev mål, men kun et middel til at gennemføre de planer, deres aldrig hvilende skabertrang tumlede med.

H. P. Hjerl Hansen var en af disse halvfemsernes mænd."

**Kapitalur úr vinnulívinum**

Sjálvandi er ikki neyðugt endiliga at fara til Danmarkar, men hetta er áhugaverd tíð úr donsku vinnulívsøguni. - Soleiðis hava flestu av okkara stóru vinnulívsmonnum livað, og hesir skapa og hava skapt kapital til samfelagið.

Tað er bara hugstoytt dag um dag at hoyra í útvarpi, síggja í sjónvarpi og dagbløðum, hvussu allir sentralistisku almennu stovnarnir við vælútbúnum fólki í høvuðsstaðnum herja á landskassan, uttan at geva sær far um, hvussu hesin kapitalur er fingin til vega, og hvussu ikki ber til at fáa meiri úr landskassanum enn tað, sum kemur í hann.

## At ummæla list

**GYÐJA HJALMARSDÓTTIR DIDRIKSEN**

At ummæla í okkara lítla landi kann vera vandamikið. Tú útsetur teg sum persón, tína útbúgving og alt tað, tú stendur fyri. Tað verður øllum loyvt, at kasta runubløk eftir tær.

Eg fari at loyva mær at takka einum av okkara ídnu ummælarum. Ein, ið torir at siga sína meining. Ein, ið grundar sína meting á millum annað sína hollu útbúgving innan list og so sín kærleika til listina. Eg tosi um okkara ótroyttuliga listaummælara Kinnu Poulsen. Tú kanst vera samd ella ósamd við tí, hon skrivar. Men har er altíð nakað at taka støðu til. Stoff til eftirtanka. Nakað, ið kann fáa okkum at síggja, hyggja á annan hátt enn vit plaga, fær okkum at tosa um list, at kjakast. Ja, enntá at øsa okkum um list. So...túsund takk fyri Kinna.

Halt áfram at øsa okkum!

## Umbering til Rás2

**HØGNI HOYDAL**



Í eini politiskari viðmerking um vikuskiftið, havi eg gjørt Rás2 órætt. Eg vildi vera við, at Gerhard Lognberg hevði fingið "fría talutíð á Rás2" í sambandi við hansara atfinningar móti sínum egnu og samgongunnar avgerðum. Hetta er ikki rætt. Gerhard Lognberg hevur ikki verið samrøddur um hetta mál á Rás2, men varð bert endurgivin úr eini grein. Eg biði um umbering fyri mistakið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.